LØGTINGIÐ

Uttanríkisráðið
Att.: Høgni Hoydal, landsstýrismaður
Postrúm 64
110  Tórshavn

Uttanlandsnevndin

**16. april 2008**
**j. nr. 7.172-20080001[3] ks/ás**
(at tilskila í svari)

*Viðvíkjandi innflutningi av rossum*

Við skrivi, dagfest 25. mars 2008, hava tygum vent tygum til Uttanlandsnevndina fyri at ráðføra tygum samsvarandi § 54 í stýrisskipan Føroya, áðrenn tygum heimila felagsnevndarformanninum at undirrita uppskot til felagsnevndaravgerð um broytingar í felagsnevndaravgerð nr. 1 frá 2001, sum varð viðløgd skrivinum til uttanlandsnevndina um ráðførðslu.

Í hesum sambandi varð fundur millum tygum og uttanlandsnevndina tann 31. mars 2008, har avtalað varð, at tygum skuldu senda nevndini eitt skrivligt svar við kunning um, hvørt nakað annað er í hesi felagsnevndaravtalu enn viðurskifti, sum hava við ross at gera.

Uttanlandsnevndin hevur einki frætt aftur frá tygum í hesum málinum og loyvir sær tí at fregnast eftir, hvussu gongst í málinum og nær Uttanlandsnevndin kann vænta sær svar upp á nevnda spurning.

N.v.

Jenis av Rana
formaður

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901